# Nýggj oljufeløg áhuga fyri



**Fleiri oljufeløg, sum ikki eru við í oljuleiting við Føroyar í dag, vísa nú áhuga fyri at vera við í leitingini komandi árini. Jarðfeingi hevur fingið fleiri fyrispurningar um komandi triðju útbjóðing og hetta heldur stjórin har vera eitt gott tekin**

OLJUTILGONGDIN
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tað sær ikki mætari út enn, at fleiri altjóða oljufeløg, sum ikki í løtuni eru virkin í oljuleitingini við Føroyar, nú standa og banka uppá dyrnar hjá okkara oljuumsiting, Jarðfeingi. Sigurð í Jákupsstovu, stjóri sær hesa positivu gongd sum eitt tekin um, at áhugi framvegis er fyri at gera íløgur í oljuleiting við Føroyar. Hann sigur, at tey hava fingið fleiri fyrispurningar frá oljufeløgum og her eisini feløgum, sum ikki hava loyvi her, um komandi 3. útbjóðing. Her er talan um áhugaverd feløg váttar hann. Tó vil hann ikki upplýsa nøvn. 3. útbjóðing er sett til at vera í byrjanini av seinasta ársfjórðingi í ár. Men innan ta tíð skal uppskot til eina nýggja útbjóðing leggjast fyri tingið. Hetta verður væntandi í ólavsøkutingsetuni. Men frammanundan skal fyrisitingin taka upp dialog við ymsar felagsskapir og stovnar, sum vara av fiskivinnu, umhvørvi, náttúru annars oø. Soleiðis at ein komandi útbjóðing ikki fer at nerva aðra vinnu og umhvørvi.

### Atgongd til data

At oljufeløg longu nú koma við fyrispurningum um komandi útbjóðing sær stjórin á Jarðfeingi sum sera positivt. Tey eru sera áhugað í at fáa data og upplýsingar frá seismiskum og

# Altíð óheppið at útseta boring

**- Tað er altíð óheppið fyri eitt øki sum okkara, at brunnar verða útsettir, tí vit hava áhuga í at fáa so nógva vitan um undirgrundina sum til ber og so skjótt sum gjørligt**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hetta sigur stjórin í Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu, nú tað hevur verið gitt, at boringin hjá BP í summar, møguliga fór at verða útsett til seinni í ár ella til í næsta ár, nú boripallurin helst verður seinkaður. Sigurð í Jákupsstovu sigur seg einki hava hoyrt um, at boringin verður útsett, men hetta er so ein spurningur millum fyristøðufelag og felagið, sum eigur boripallin og ikki nakað, sum føroyskir myndugleikar leggja seg út í.

Tað, sum annars liggur fast við boring á landgrunninum, er Williambrunnurin, sum BP ætlar at bora í ár. Síðani hevur ENI sagt seg vilja bora Anne Marie brunnin í 2008 ella 2009. Higartil hevur verið mett, at hann fór at verða boraður í 2008, men sum skilst, so er rásarúmið kortini longri, soleiðis at hann kann eisini verða boraður í 2009.

Oljufelagið Chevron hevur fyrr sagt frá, at tað umhugsar at bora ein brunn í sínum 008 loyvi beint við markið í 2008 ella 2009. Sosialurin skilur, at felagið helst fer at skjóta seismikk í økinum longu í summar. So okkurt kundi bent á, at felagið er við til at rigga seg til sína fyrstu boring á føroyska landgrunninum. Tað áliggur so feløgunum, sum fingu loyvi í 2. útbjóðing, at gera seismiskar kanningar, sum so aftur skulu vera grundarlag undir støðutakan til, um tey vilja bora ella ikki. Sum skilst eru tað eisini seismikkfeløg, sum eru sinnað til at gera kanningar í summar fyri egna rokning – við vón um at kunna selja upplýsingarnar víðari til oljufeløg, sum hava fingið leitiloyvi.

### Sær gott út

Hóast tað eru gingin meira enn 10 ár síðani, at føroyskir myndugleikar fóru undir fyrireikingar til at leita eftir olju og gassi á landgrunninum, og vit framvegis ikki hava gjørt nakað lønandi oljufund, so heldur stjórin á Jarðfeingi, Sigurð í Jákupsstovu ikki, at nøkur orsøk er til stúran. Hann vísir á, at neyðugt er at brynja seg við toli í hesi bransjuni. – Tað er við at ganga rætta vegin aftur við áhuganum, hóast hetta ikki